# Samskipan – umsøgn og grundliður

Her fært tú frágreiðing um, hvussu tú finnur liðirnar umsøgn og grundlið í tekstinum.



Tú skalt fyrst finna umsøgnina. Umsøgnin er eitt sagnorð, sum stendur í nútíð ella tátíð. Tú finnur sagnorðið við at seta eg ella at framman fyri orðið.

Set ein ring undir umsøgnina.

O

Grundliðin finnur tú við at spyrja, hvør ella hvat dansar.

Set kross undir grundliðin.

X

Ein maður dansar.
X O

Ein liður kann vera eitt orð ella fleiri orð, sum hoyra saman.

Í mánalýsi dansar ein gamal maður
O X
í høgum hatti fyri strípiputu kettuni.

